*Loreena McKennitt: – Írar hálova teirri serírsku mentantini sum ongantíð fyrr. Har er sjálv mentanin ein vøra, sum verður útflutt. Allur heimurin syngur írskar drykkjuvísir Áhugavert er at síggja, hvussu summi lond varðveita ein mentanarv, meðan onnur bara lata hann doyggja*



hitta fólkið, men vit fara at royna at fáa okkum eitt sindur av frítíð til at hyggja okkum um, har vit eru.

Men um eg einaferð komi til Føroya eri eg vís í, at eg fari at taka okkurt heim við mær aftur. Eg skilji, at tann føroyski upprunatónleikurin ikki hevur instrumentir, ið eg kann taka við mær, annað enn rødd og rútmu. Men eg eri vís í, at kvæðaløgini tú tosar um eru áhugaverd og vøkur. Eg síggi Føroyar sum eina nýggja spennandi óopnaða hurð á míni ferð, og kanska er tað eisini ein av teimum heilt týdningarmiklu, hvør veit. Eg veit ikki so nógv um Føroyar enn, men tað, sum tú fortelur mær ljóðar sera spennandi.

### Latið ikki føroyska dansin doyggja út!

Tað er ein ófyrigevilig synd at lata ein aldargamlan mentanararv forfarast, og serstakliga, um hann er so einastandandi og sermerktur sum tann føroyski, men soleiðis er gongdin ofta, tá gomul ættarlið verða avloyst av nýggjum. Gamlir siðir verða antin latnir í nýggjan ham, ella tveittir burtur, tí teir vera hildnir at vera avoldaðir, og hetta seinna vísir seg tíverri alt ov ofta at vera lættara loysnin.

Men tað er í grundini løgið, tí eg veit, at í Onglandi hava gamlir mentanarsiðir og gamal tónleikur ofta ringt við at verða varðveittir, ímeðan írar hálova teirri serírsku mentanini sum ongantíð fyrr. Har er sjálv mentanin ein vøra, sum beinleiðis verður útflutt. Allur heimurin syngur írskar drykkjuvísur, og allir heimsins stórbýir hava írskar pubbar. Tað er áhugavert at síggja, hvussu summi lond varðveita ein mentanararv, ímeðan onnur bara lata hann doyggja. Ofta sær tað út til, at tað er ein mentanarlig undirlutakensla, ið ger seg galdandi í eini alheimsgerð, har ein dag og dagliga sær so nógv fremmant mentanartilfar. Globali tónleikaídnaðurin hevur jú skapt eina kommersiella strada av lokkandi jetset-mentan, ið nýggju ættarliðini eyðvitað halda vera tann einasta mentanin, ið er nakað verd, og at alt annað tískil má vera útgingið og avlagt.

Eitt nú tykist tað næstan sum um, at tann lokali tónleikurin má vera ein partur av tí livandi vevnaðinum í eini mentan, um hann skal hava nakra vón um at verða varðveittur.




*Loreena gav sær góðar stundir at tosa við umboð fyri Sosialin, ið góvu henni hópin av føroyskum fløgum og eisini hesa bókina um Føroyar, sum hon tók við sær heim til Kanada*

### Hørpuríma og The Bonny Swans

Vit tosa eitt sindur aftur og fram um Føroyar, mentanarvirði og alheimsgerð, og eg greiði henni frá, at hon hevur góðar orsøkir til at seta granskingarluppin á Føroyar og Norðurlond, tí vit her norðuri eru ikki heilt óviðkomandi tá talan er um keltisk eyðkenni í ævintýrum, vísum, kvæðum og sagnum. Og onkustaðni er líkleikin enntá ræðandi stórur.

Eitt av kendastu løgunum hjá Loreenu er "The Bonnie Swans" av útgávuni The Mask and the mirror frá 1994. Lagið er ein stytt tulking av einum aldargomlum fápli, ið Loreena kom fram á, tá hon granskaði tey gitnu einhyrningamyndateppini (the unicorn tapestries), ið eru vovin meisataraverk úr miðaldarbretlandi, har kristinsøgan er samanbregdað við eldri heidnari ikonografi og myndamáli. Her er ein ørgrynna av gátuførdum søgum og myndaevnum, millum aðrar henda undranarverda og ikki sørt myrka søgan um tríggjar systrar, har ein av teimum eldru druknar ta yngstu í øvund. Henda yngsta systurin verður so umskapað til ein svana, sum í vesturevropeiskari miðaldarmentan ímyndar deyðan. Líkið av gentuni verður síðani gjørt til eina hørpu, sum í elligomlum keltiskum myndamáli ímyndar sálina og hitt æviga lívið hjá sálini. Í søguni kemur harpan síðani fram fyri faðirin, har hon við tónum sínum avdúkar morðið, ið er framt.

Í Føroyum og í fleiri av hinum Norðanlondunum hava vit Hørpurímu (eisini stavað Harpuríma), sum er eitt stutt kvæði við ókendum uppruna. Hørpuríma snýr seg eisini um eina eldri systur, sum í øvundsjúku letur ta yngru drukna. Tveir vallarar finna líkið av gentuni og gera eina hørpu úr tí. Teir fara so beint í brúðarhúsið hjá teirri eldru systrini, har hørpan eisini avdúkar alla illgerðina.

Loreena tykist at vera sera hugtikin av hesi óvæntaðu samanrenning, og sigur, at hon ætlar sær avgjørt at kanna hetta nærri.

Við mær havi eg fingið ymiskt tilfar um Føroyar at geva henni, saman við nøkrum útvaldum føroyskum fløgum, ið hon takkar so miriliga fyri. Eg havi eisini tikið eitt heimskort við mær, men tíverri eru Føroyar ikki við á hesum kortinum, so eg verði noyddur at tekna ein lítlan svartan prikk á næsta ferðamálið hjá Loreenu McKennitt.

Eg síggi, at klokkan er nú vorðin meira enn vit høvdu ætlað, og um Loreena skal fáa sín vanliga rennitúr áðrenn konsertina, verði eg noyddur til at sleppa henni nú.

Eg takki henni fyri prátið og vóni at eg ikki havi overvað hana við reypi og stórtosi um eitt land, sum nóg illa sleppur við á heimskortið.

(Lesið eisini ummælið av konsert við Lereenu McKennitt í Sosialinum mánadaagin.)

## Útgávur hjá Loreenu McKennitt:

*Elemental* (Quinlan Road, 1985)
*To Drive the Cold Winter Away* (Quinlan Road, 1987)
*Parallel Dreams* (Quinlan Road, 1989)
*The Visit* (Quinlan Road, 1991)
*The Mask and the Mirror* (Quinlan Road, 1994)
*A Winter Garden: Five Songs for the Season* (Quinlan Road, 1995)
*The Book of Secrets* (Quinlan Road, 1997)
*Live in Paris and Toronto* (Quinlan Road, 1999)
*An Ancient Muse* (Quinlan Road, 2006)
*Nights from the Alhambra* (Quinlan Road, 2006)

Kring allan heimin eru tilsamans eru seld yvir 13 milliónir eintøk av sjey studioútgávum, tveimum liveupptøkum og eini live dvd.

### Heiðursbrøv og Virðislønir:

Juno Award, Best Roots/Traditional Album 1992, fyri *The Visit*
Juno Award, Best Roots/Traditional Album 1994, fyri *The Mask and the Mirror*
Billboard International Achievement Award 1997
Headline performer fyri HH Drotning Elizabeth II og Philipi Prinsi, The Golden Jubilee Celebrations, Manitoba, 2002
Heiðursdoktari í bókmentum, Wilfried Laurier University, 2002
Order of Manitoba, 2003
Limur of the Order of Canada, 2004
Heiðursdoktari í løgfrøði, University of Manitoba, 2005
Kanadiskur Sendiharri, Hans Christian Andersen Bicentennary, 2005
Heiðursdoktari í løgfrøði, Queens University, 2005



*Loreena McKennitt er enn ókend í Føroyum. Føroyski listarmaðurin Jóannes Lamhauge vónar, at hann við prátinum í dag og einum konsertummæli í Sosialinum komandi mánadag umframt eini sending í Rás 2 mánadagin kl. 11 kann vera við til at fanga áhugan hjá føroyingum fyri hesi sjáldsomu songkvinnuni við tí serstaka írska ljóðinum.*